# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2007

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2007 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á umsiting løgtingsins, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Beintu Dam og Løgtingsins umboðsmanni, Sólju í Ólavsstovu, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av úrslitinum av virksemi Løgtingsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2007 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrarroknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri hvussu rakstrarroknskapurin er uppsettur. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um rætti persónur hevur ávíst og váttað skjølini, um rætt er bókað og at skjølini annars hoyra stovninum til. Gjøgnumgongd okkara hevur ikki ført til nakrar viðmerkingar.

Undir grannskoðanini verða upphæddirnar í rakstrarroknskapinum kannaðar, samanhildnar við undanfarin ár og við givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fyri 2007 og fram til 29. november 2008. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Játtan**
Tann samlaða játtanin til løgtingið er uppá 41,8 mió.kr. og er sundurdeilt soleiðis niður á øki(mió.kr.):

| Stovnur | 2007 | 2006 | øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsarbeiði | 27,7 | 25,8 | 7,3 % |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | 2,0 | 24,5 | -91,8 % |
| Landsgrannskoðanin | 5,6 | 5,1 | 11,0 % |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 3,2 | 3,2 | 0,7 % |
| Løgtingsins umboðsmaður | 3,2 | 3,0 | 6,7 % |
| **Tilsamans** | **41,8** | **61,6** | **-32,1 %** |

Játtanin til løgtingsarbeiði er sundurdeilt soleiðis(mió.kr.):

| Stovnur | 2007 | 2006 | øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsmenn | 17,6 | 17,2 | 2,6 % |
| Fyrisiting løgtingsins | 8,1 | 6,6 | 22,0 % |
| Stuðul til parlamentariskt arbeiði | 1,6 | 1,6 | 1,0 % |
| Eftirlitsuppgávur | 0,5 | 0,5 | 0,0 % |
| **Tilsamans** | **27,7** | **25,8** | **7,4 %** |

Sum tað framgongur omanfyri, so er tann størsta einstaka økingin í játtanini til fyrisiting løgtingsins – ein øking uppá 22% samanborið við 2006. Eisini er játtanin til landsgrannskoðanina økt við 11% samanborið við 2006.

Tann samlaða minkingin er uppá 32,1 % samanborið við 2006 – hetta er ein minking uppá 19,7 mió.kr. Tann størstan einstaka minkingin er til nýggjan bygning til Føroya Løgting, har játtanin er minkað við 91,8%.

Verður sæð burtur frá bygninginum, er talan um eina øking uppá 2,7 mió. kr. ella 7,2%.

**Lønir v.m.**
Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2007. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn, Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðv. fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 1998 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Reglurnar í hesum rundskrivum verða í høvuðsheitum fylgdar, men tað kemur fyri, at serliga uttanfyri Danmark ikki ber til at fáa innivist fyri ásetta takstin. Eisini kann viðmerkjast, at verður tingmaður bjóðaður uttanlands, saman við hjúnafelag, fær hjúnarfelagin dagpening og endurgjald á jøvnum føti við tingmannin.

Staðfest er, at í nøkrum førum verða ferðauppgerðir ikki gjørdar upp skjótast møguligt eftir heimkomu. Mælt verður til at betra hetta, soleiðis at ferðauppgerðir kunnu verða latnar løgtingsskrivstovuni skjótast til ber, soleiðis at tryggja verður, at møgulig skuld verður avroknað í seinasta lagi 3 vikur, eftir heimkomu, samsvarandi rundskrivi um tænastuferðir uttanlands, ið kom í gildi tann 1. juli 1998.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**

Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Leivur Harryson, landsgrannskoðari, hevur sagt seg úr starvi frá 1. januar 2008. Sum nýggjur landsgrannskoðari er settur Beinta Dam, sum sostatt tekur við starvinum hin 1. januar 2008.

Fleiri viðmerkingar eru ikki í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

Stuðulin verður goldin, sambært Floksskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 78 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 42 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini skal grannskoðari løgtingsins eisini grannskoða henda roknskapin.

Løgtingsskrivstovan umsitur stuðulin, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina av, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Løgtingsskrivstovan hevur góðkent og ávíst skjølini, sum ábyrgdarpersónur fyri viðkomandi tingbólk, hevur váttað.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| T.kr./flokkur | A | B | C | D | E | F | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingi | 7 | 7 | 7 | 1 | 8 | 2 | 32 |
| Grundupphædd §1 | 78 | 78 | 78 | 78 | 78 | 78 | 470 |
| Tingmannaupphædd §2 | 253 | 253 | 253 | 0 | 295 | 42 | 1.096 |
| Stuðul tilsamans | 331 | 331 | 331 | 78 | 373 | 120 | 1.566 |
| Nýtsla 2007 | 337 | 331 | 331 | 83 | 324 | 95 | 1.501 |
| Meir/Minninýtsla | 6 | 0 | 0 | 5 | -50 | -26 | -65 |
| Lønir | 273 | 328 | 344 | 63 | 229 | 80 | 1.317 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 108 | 162 | 178 | 24 | 42 | 20 | 534 |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 105 | 162 | 178 | 21 | 67 | 33 | 566 |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, so er talan um eina minninýtslu samanlagt uppá 65 t.kr., tó hava fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin nýtt tils. 11 t.kr. meira enn játtað. Flokkarnir eru gjørdur varugur við hetta av løgtingsskrivstovuni. Grannskoðanin fer í hesum sambandi at vísa á, at sanktiónsmøguleikar ikki eru til staðar fyri flokkar, sum ikki halda latnu játtanina, ella fyri flokkar, sum nýta játtanina til onnur endamál, enn tað, sum ætlanin er. Heitt verður á formansskapin um at umhugsa sanktiónsmøguleikar hesum viðvíkjandi.

Víst verður á, at javnaðarflokkurin hevur nýtt meira til lønir, enn hvat játtanin til økið er. Hóast hesa meirnýtslu hevur flokkurin ikki eina meirnýtslu, samanlagt, í árinum. Hetta er grundað á, at flokkurin somuleiðis hevur inntøkur.

Spurningurin um ásetingin, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni, hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2007 lúka allir flokkar hesa áseting.

Vit endurgeva § 4 í reglugerðini um "stuðul til parlametariskt arbeiði" frá 25. januar 2000 niðanfyri:

> *"§4 Í minsta lagi helvtin av stuðlinum eftir § 1 skal nýtast til skrivara/r, sum hevur skrivstovu í somu hølum sum flokkarnir á tingi"*

**Setanarskriv hjá Tinglimum**

Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men tað vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

**Roknskapargóðkenning**

Í frágreiðing okkara undanfarin ár er heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra

váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina, Løgtingsskrivstovuna og Løgtingsins Umboðsmann. Arbeitt hevur verið við málinum, tó uttan at avgreiða hetta. Heitt verður á formansskapin um at taka støðu til, um váttanarmannagongd skal setast í verk.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2006**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2006.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2007.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2007. Upphæddirnar fyri 2006 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2007 | t.kr. Játtan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | D | 2.917 | 3.224 | 2.974 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 16.721 | 17.608 | 16.681 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.501 | 1.566 | 1.454 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 500 | 0 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 8.366 | 8.052 | 6.295 |
| Løgtingsarbeiði tilsamans | A | 26.588 | 27.726 | 24.431 |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | E | 2.185 | 2.000 | 22.829 |
| | | **31.689** | **32.950** | **50.234** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 4.897 | 5.630 | 4.479 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 2.701 | 3.200 | 2.742 |
| | | **7.598** | **8.830** | **7.221** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **39.287** | **41.780** | **57.455** |
| Játtan tilsamans | | 41.780 | | 61.591 |
| **Minninýtsla í mun til játtan** | | **2.493** | | **4.136** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2006. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Frávik kunnu verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2007, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum, fyriuttan fyrisiting løgtingsins, og nýggjum bygningi til Føroya Løgting. Kostnaðurin er

samanlagdur 39,3 mió.kr., meðan játtanin er uppá 41,8 mió.kr. Kostnaðirnir eru lækkaðir samanlagt við 18,2 mió.kr., í mun til 2006. Høvuðsorsøkin til hetta er, at nýtslan í sambandi við nýggjan bygning til Føroya Løgting er 20,6 mió.kr. lægri í 2007 enn í 2006.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar, í mun til 2006 og í mun til ætlanina fyri 2007 (t.kr.):

| | 2007 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2006 | Munur 2006-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 13.350 | 13.638 | -288 | 13.175 | 174 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.214 | 1.815 | -601 | 1.378 | -164 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 43 | 0 | 43 | 0 | 43 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 1.875 | 1.950 | -75 | 1.860 | 15 |
| Tilskot til útlandið | 242 | 225 | 17 | 270 | -28 |
| Søla av vørum og tænastum | -3 | -20 | 17 | -2 | -1 |
| | **16.721** | **17.608** | **-887** | **16.681** | **39** |

Verður samanborið við játtanina er talan um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 288 t.kr. Tó eru lønirnar øktar við 174 t.kr., samanborið við 2006. Somuleiðis er talan um eina minninýtslu í sambandi við keyp av vørum og tænastum uppá 601 t.kr., samanborið við játtanina. Samanlagt er nýtslan 682 t.kr. minni enn játtanin, talan er um eina meirnýtslu uppá 39 t.kr., samanborið við 2006.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2007 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2006 | Munur 2006-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.317 | 1.196 | 121 | 1.132 | 184 |
| Keyp av vørum og tænastum | 134 | 200 | -66 | 250 | -115 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 50 | 170 | -120 | 72 | -22 |
| | **1.501** | **1.566** | **-65** | **1.454** | **47** |

Talan er um eina meirnýtslu viðv. lønum uppá 121 t.kr. Talan er um eina minninýtsla uppá 120 t.kr. viðv. keypi av útbúnaði. Samanlagt er talan um eina minninýtslu uppá 65 t.kr., í mun til játtan. Kostnaðurin er 47 t.kr. størri í 2007 samanborið við 2006.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2006 og í mun til ætlan fyri 2007 (t.kr.):

| | 2007 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2006 | Munur 2006-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.850 | 4.974 | -124 | 4.588 | 262 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.675 | 2.263 | -588 | 1.354 | 321 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.817 | 800 | 1.017 | 281 | 1.536 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 34 | 15 | 19 | 59 | -25 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 20 | 0 | 20 | 13 | 7 |
| Søla av vørum og tænastum | -32 | 0 | -32 | -1 | -31 |
| Skattur og avgjøld | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| | **8.366** | **8.052** | **314** | **6.295** | **2.071** |

Útgreiningin vísir, at kostnaðir eru 314 t.kr. meira enn játtað. Største meirnýtslan er við keyp av útbúnaði, sum er 1.017 meira enn játtað. Hetta er samstundis 1.536 t.kr. meira enn í 2006. Keyp av vørum og tænastum eru 588 t.kr. minni enn játtað, og lønarkostnaðir eru 124 t.kr. minni enn játtað. Samanborið við 2006 hevur fyrisiting løgtingsins eina meirnýtslu uppá 2.071 t.kr.

Í skjali A, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2006 og í mun til ætlan fyri 2007 (t.kr.):

| | 2007 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2006 | Munur 2006-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.463 | 4.193 | -730 | 3.400 | 62 |
| Keyp av vørum og tænastum | 919 | 851 | 68 | 691 | 228 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 136 | -56 | 29 | 51 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 313 | 328 | -15 | 310 | 3 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | 2 | 0 | 2 | 0 |
| Innanh. flytingar | 61 | 0 | 61 | 0 | 61 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 58 | 120 | -62 | 47 | 12 |
| | **4.897** | **5.630** | **-733** | **4.479** | **417** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum - uppá 62 t.kr., í mun til 2006. Í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 730 t.kr. á lønarøkinum. Kostnaðurin til keyp av vørum og tænastum er hækkaður við 228 t.kr., í mun til 2006 – og frávikið í mun til ætlan er uppá 68 t.kr. Samanlagt hevur stovnurin eina minninýtslu uppá 733 t.kr. í 2007. Kostnaðirnir eru hækkaðir við 417 t.kr., í mun til 2006.

Í skjali B, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2006 og í mun til ætlan fyri 2007 (t.kr.):

| | 2007 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2006 | Munur 2006-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.018 | 2.300 | -282 | 2.146 | -128 |
| Keyp av vørum og tænastum | 484 | 630 | -146 | 427 | 57 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 47 | 70 | -23 | 16 | 30 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 152 | 200 | -48 | 152 | 0 |
| | **2.701** | **3.200** | **-499** | **2.742** | **-40** |

Í mun til ætlanina er talan um eina minninnýtslu uppá 499 t.kr. Største minninýtslan er innan lønir v.m. - minninýtslan er uppá 282 t.kr. Samanborið við 2006 eru kostnaðirnir lækkaðir við 40 t.kr.

Í skjali C, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Grannskoðaraváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, tann 2. februar 2009

**Sp/f Grannskoðaravirkið** ***INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

| | |
|---|---|
| Jógvan Joensen | Óli Joensen |
| løggildur grannskoðari | skrás. grannskoðari |

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, tann ___ / ___ - 2009.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| ______________ | ____________ | _______________ | _____________ |
| Hergeir Nielsen | Jógvan á Lakjuni | Alfred Olsen | John Johannesen |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI

| Løgtingsmenn | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarløn t | 12.620 | | 12.532 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 326 | | 307 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 403 | | 337 |
| **Lønir v.m.** | **13.350** | **13.638** | **13.175** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 4 | | 22 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 780 | | 829 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 39 |
| Umboðan | 349 | | 157 |
| Keyp av vørum annars | 4 | | 1 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 77 | | 329 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.214** | **1.815** | **1.378** |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 43 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **43** | **0** | **0** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Utreiðslugreiddar veitingar | 1.875 | | 1.860 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **1.875** | **1.950** | **1.860** |
| Altjóða felagsskapir | 242 | | 270 |
| **Tilskot til útlandið** | **242** | **225** | **270** |
| Vørusøla til privat | -3 | | -2 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-3** | **-20** | **-2** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **16.721** | **17.608** | **16.681** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 836 | | 693 |
| Tænastumenn | 3 | | 96 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 381 | | 278 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 38 | | 28 |
| Eftirlønir | 59 | | 37 |
| **Lønir v.m.** | **1.317** | **1.196** | **1.132** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 10 | | 20 |
| Umboðan | 0 | | 1 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 1 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | -25 | | 73 |
| Telefon | 76 | | 63 |
| Postgjøld | 0 | | 2 |
| Grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 39 | | 8 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 1 | | 9 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 33 | | 73 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **134** | **200** | **250** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 5 | | 65 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 45 | | 7 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **50** | **170** | **72** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.501** | **1.566** | **1.454** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **500** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **500** | **0** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 3.452 | | 3.262 |
| Tænastumenn | 638 | | 631 |
| Tímalønt | 237 | | 228 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 13 | | 11 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 137 | | 109 |
| Eftirlønir | 436 | | 356 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -64 | | -9 |
| **Lønir v.m.** | **4.850** | **4.974** | **4.588** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 1 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 22 | | 59 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 14 |
| Umboðan | 23 | | 7 |
| Orkukeyp - el | 135 | | 37 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 213 | | 160 |
| Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a., olja, oljuúrdráttir c | 24 | | 0 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 17 | | 4 |
| Keyp av vørum annars | 325 | | 153 |
| Telefon | 54 | | 192 |
| Postgjøld | 5 | | 12 |
| Grannskoðar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 59 | | 67 |
| Trygging | 42 | | 41 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 321 | | 242 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 435 | | 368 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.675** | **2.263** | **1.354** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 1.726 | | 26 |
| Skrivstovuútbúnaður | 0 | | 305 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 108 | | 0 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb. | -16 | | -50 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **1.817** | **800** | **281** |
| Húsaleiga | 11 | | 10 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 23 | | 49 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **34** | **15** | **59** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 20 | | 13 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **20** | **0** | **13** |
| Vørusøla til privat | -32 | | -1 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-32** | **0** | **-1** |
| Morarentur | 1 | | 0 |
| **Skattur og avgjøld** | **1** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **8.366** | **8.052** | **6.295** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐI TILSAMANS** | **26.588** | **27.726** | **24.431** |

| SKJAL B: | LANDSGRANNSKOÐANIN | | |
|---|---|---|---|
| **Vanligt virksemi** | **t.kr. 2007** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2006** |
| Mánaðarlønt | 1.873 | | 1.889 |
| Tænastumenn | 1.121 | | 1.050 |
| Tímalønt | 110 | | 161 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 12 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 98 | | 82 |
| Eftirlønir | 249 | | 217 |
| **Lønir v.m.** | **3.463** | **4.193** | **3.400** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 12 | | 7 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 146 | | 135 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 29 | | 10 |
| Umboðan | 51 | | 8 |
| Matur og drykkjuvørur | 2 | | 2 |
| Orkukeyp - el | 13 | | 18 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 23 | | 26 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 16 | | 11 |
| Keyp av vørum annars | 59 | | 67 |
| Telefon | 16 | | 16 |
| Postgjøld | 8 | | 7 |
| Trygging | 1 | | 1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 95 | | 48 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 447 | | 334 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **919** | **851** | **691** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 20 | | 27 |
| Skrivstovuútbúnaður | 0 | | 0 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 60 | | 2 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **80** | **136** | **29** |
| Húsaleiga | 304 | | 304 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 4 | | 4 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 5 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 0 | | 2 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **313** | **328** | **310** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 2 | | 2 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **2** | **2** | **2** |
| **Rentukostnaður o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 61 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **61** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **4.838** | **5.510** | **4.433** |

**SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald**

| **Løgtingsgrannskoðararnir** | **t.kr. 2007** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2006** |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 57 | | 46 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 2 | | 1 |
| | **58** | **120** | **47** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **58** | **120** | **47** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **4.897** | **5.630** | **4.479** |

## SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

| Vanligt virksemi | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.188 | | 1.295 |
| Tænastumenn | 638 | | 673 |
| Tímalønt | 36 | | 33 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 30 | | 9 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 58 | | 52 |
| Eftirlønir | 162 | | 179 |
| Endurgjald ísamband við lønir | -94 | | -94 |
| **Lønir v.m.** | **2.018** | **2.300** | **2.146** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 4 | | 1 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 72 | | 80 |
| Umboðan | 8 | | 3 |
| Orkukeyp - el | 7 | | 9 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 12 | | 13 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 8 | | 6 |
| Keyp av vørum annars | 40 | | 41 |
| Telefon | 23 | | 34 |
| Postgjøld | 9 | | 10 |
| Trygging | 3 | | 1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 119 | | 76 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 180 | | 153 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **484** | **630** | **427** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 47 | | 15 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 2 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **47** | **70** | **16** |
| Húsaleiga | 152 | | 152 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **152** | **200** | **152** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **2.701** | **3.200** | **2.742** |

## SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN

| Kostnaður | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 0 | | 155 |
| Tænastumenn | 0 | | -8 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0 | | 4 |
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **152** |
| Tænastumannaeftirlønir | 2.917 | | 2.822 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **2.917** | **3.224** | **2.822** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **2.917** | **3.224** | **2.974** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Kostnaður | t.kr. 2007 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 16 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **16** | **0** | **0** |
| Frádráttur fyri løguløn | -16 | | 0 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **-16** | **0** | **0** |
| Bygningar, privat | 2.169 | | 22.829 |
| Bygningar, alment | 16 | | 0 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **2.185** | **2.000** | **22.829** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **2.185** | **2.000** | **22.829** |